Venjingar-
uppgáva
13

Endar orðið við *i* ella við *ið*? Set ring um tað rætta.

| | i | ið |
|---|---|---|
| Eg búgvi í einum hús____ tætt við skúlan | a | b |
| Hús___ er hvítt | ð | i |
| Kamar___ hjá mær er rættiliga hugnaligt | i | t |
| Eg eri ofta inni á mínum kamar___ | s | u |
| Mær dámar serliga væl at vera har um kvøld___ | ð | l |
| Eg eri ofta úti, tá ið veðr____ er gott | r | s |
| Tað er keðiligt at vera úti í ringum veðr___ | g | n |
| Eg ætli mær oman í neyst___ hjá abba í dag | o | s |
| Tað verður ikki beint nú, tí eg fari fyrst í seyðahús____ | s | a |
| Seyðahús___ er beint við húsini hjá okkum | n | r |
| Ærin hjá okkum lembdi í gjár. Lamb___ er so fitt | y | i |
| Hetta er fyrsta lamb___ hjá okkum í ár | k | n |
| Skjótt fara ærin og lambi___ út | i | a |
| Tað er betri hjá teimum at vera úti í so góðum veðr___ | ó | d |
| Nú vár____ er komið, er tað vorðið heitari | k | u |
| Heyst____ var ikki serliga heitt, og veturin var kaldur | r | l |
| Soleiðis er tað ikki á hvørjum ár____ | r | i |
| Nú síggi eg abba. Hann stendur við vindeyga___ | ø | s |
| Honum dámar væl at hyggja út gjøgnum vindeyga___ | v | r |
| Tá ið hann sær meg, kemur hann rennandi út í tún___ | h | i |
| Tá kom omma við einum bomm___ til mín | a | ð |

Set bókstavirnar saman, har tú setti ring um *ið*:

Set bókstavirnar saman, har tú setti ring um *i*: